# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Parlamentariska støðan

Vit fara nú inn í eina viku, ið á mangan hátt er avgerandi fyri politisku lagnuna hjá landsstýrissamgonguni. Í hesi vikuni verður síðsta hond løgd á løgmansrøðuna, har støðan verður lýst. Í politisku støðuni eru tvey mál, ið elva til trupulleikar, tunnilsætlaninar og fiskivinnupolitikkurin. Herumframt spøkja onnur løgin og keðilig mál, sum ikki beinleiðis koma undir heitið stór innanlendispolitisk mál, men sum eru við til at geva almenninginum myndina av eini skinklandi samgongu. Tað er ein spurningur, hvussu leingi samfelagið tolir ta óvissu, sum stendst av hesari ótryggu politisku støðu. Men hetta til ólavsøku hendir neyvan nakað dramatiskt. Hinvegin eigur løgmaður at fáa parlamentarisku støðu samgongunnar avkláraðað í sambandi við oðraskiftið um løgmansrøðuna.

Vikan, ið fór, gav eina mynd av eini samgongu, har løgtingsmeirilutin meira enn rillar. Meðan Páll á Reynatúgvu er komin til sættis við samgonguna, hevur Gerhard Lognberg sett hart ímóti hørðum. Flokkur Gerhards tykist ikki at vera semjusinnaður, og Gerhard hevur fingið knívin á barkan. Sum tað sær út, so ber ímóti, at Gerhard antin meldar seg út úr flokkinum ella verður ekskluderaður. Javnaðarflokkurin hevur í síni longu søgu ikki siðvenju fyri at takla innanhýsis ósemjur við góðum handalag. Tann, ið ikki aktar, verður hóttur við ekslusjón ella verður ekskluderaður. Hetta er løgið, tí í søgu flokksins hava eksklusiónir ella eksklusjónsroyndir ongantíð gagnað flokkinum. Tað má tí ikki undra, at formaður Javnaðarflokksins á tingi alment nýtir so harðligan málburð mótvegis egnum flokksfelaga, ið hevur sínar politisku røtur í tí "gamla" Javnaðarflokkinum. Tað er í heila tikið ein løgin samskiftisformur, hetta alment at tykta partamenn við bombastiskum almennum proklamatiónum. Hví ikki seta seg niður og tala um tingini? Hvar er galið við dialoginum? Víst gevur hann ikki so nógv publicity sum proklamatiónirnar, men hann hevur heilt síðan dagar Periklesar verið høvðusamboðið í fólkaræði.

Løgmaður er sperdur av hesi støðu og hann hevur fýra valkostir. Hann kann royna at koma til sættis við Gerhard, hann kann taka Sjálvstýrisflokkin upp í sítt parlamentariska støði, hann kann venda sær til annan av teimum stóru borgarligu andstøðuflokkunum, ella hann kann skriva nýval. Tað mest einfalda er at semjast við Gerhard, men vansin er, at tað eru fleiri "Gerhardar" í samgonguni. Annað alternativið er freistandi, men "Kárarnir" eru tveir politiskir ribbaldar, sum vera bæði dýrir og óstýriligir. Triðja alternativið man geva trupulleikar við fiskivinnupolitikkinum og blokkinum, men hetta skuldi verið ein avbjóðing fyri lømann. So er tað fjórða alternativið, sum ikki er tespiligt, men sum gerst meira realistiskt fyri hvønn dag. Eitt er vist: henda støðan kann ikki standa við.

**Sosialurin**

## Til samgonguleiðaran, Jóhannes Eidesgaard

GERHARD LOGNBERG



Nú formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins hevur sagt, at Sandoyartunnilin hevur ongantíð verið so nær sum nú og beinleiðis leggur meg undir at "sabotera" ætlanina, fari eg at spyrja samgonguna hesar spurningar, sum eg ikki havi fingið svaraðar:

Tá ið sagt verður av summum samgongulimun, at í november 2010 eru 150 mió í partafelagnum til Sandoyartunnulin. Vil tað so siga, at byrjast skal at borða í november/desember 2010 og um so er, verður hetta so samtykt við lóg.

Landsstýriskvinnan og løgmaður hava sagt, at báðir tunnlarnir, verða ikki gjørdir samstundis, gev mær greitt at vita, hvør tunnil skal gerast fyrst. Hetta hevur jú alstóran týdning fyri málið.

Um byrjað verður at bora fyri Sandoyartunnlinum í nov/des 2010, og hetta verður samtykt við lóg, so eri eg partur av samgonguni.

Eg vil hava svar upp á hesar báðar spurningar innan mikudagin, 23 juli kl 15,00.

Suðurparturin av Føroyum hevur brúk fyri tunnlinum

Tað mátti vakt ans hjá samgonguleiðaranum, at einastu sýslur í landinum, sum hava afturgongd í fólkatalinum, eru Sandoyar sýsla og Suðuroyar sýsla. Tað er neyðugt, at vit arbeiða langtsiktað við at bjarga sunnaraparti av Føroyum, hetta er eitt arbeiði sum má byrja skjótast gjørligt!

Við Javnaðarkvøðu

(Avrit er sent til: Bjørt Samuelsen, landstkv. - Jóhannes Eidesgaard, løgmann, tingbólk Javnaðarfloksins - fjølmiðlarnar - lokalfelag Javnaðarfloksins í Sandoynni)

## Loysn á tunnilsmálinum

VOLMAR HØJGAARD

Spell var, at málið um Skálafjarðatunnilin og Sandoyartunnilin skuldi enda í slíkum hurlivasa.

Men grundin er nógvu ivamálini í 'Semjuni' hjá tunnilsbólkinum. M.a.:

Nær skulu tunlarnir gerast?

Hvør tunnil skal gerast fyrst?

Hvussu skulu 50 mill. kr. árliga finnast á fíggjarlógini, nú inntøkurnar hjá landinum standa í stað ella lækka?

Er rætt at økja skuldina hjá landinum tvær milliardir?

Skulu brúkarar av Skálafjarðatunlinum gjalda fyri Sandoyartunnilin?

Úrslitið av hesi 'semju' kann nú lætt føra til samgonguslit, og so gongur aftur rúm tíð áðrenn nakað hendir í málinum.

Men tað ber til at finna eina loysn.

Loysnin kann byggja á, at

1) Privata felagið aftan fyri Skálafjarðatunnilin sleppur í gongd beinan vegin. Men ein av treytunum fyri loyvinum verður, at gjøgnumkoyrandi akfør gjalda t. d. 5 krónur pr. túr til útbygging av vegakervinum aðrastaðni - m. a. til Sandoyartunnilin. (Mett árlig inntøka 8-10 mill.)

2) Sama 5-krónu-gjald verður innført fyri Vága- og Norðoyatunnilin. (Mett árlig inntøka 6-8 mill.)

3) Ein króna pr. litur verður løgd oman á prísin á bensini og diesel. (Mett árlig inntøka 30-35 mill.)

Hesar umleið 50 mill. árligu krónurnar fara í almenna partafelagið, sum skal standa fyri Sandoyartunlinum. Og felagið fer í gongd beinan vegin.

Tað eru nógvir fyrimunir við hesi loysnini. T.d.

Landið sleppur frá eini skuldarbinding upp á eina milliard fyri Skálafjarðartunnilin. Men fær kortini inntøkur haðani.

Báðir tunlarnir kunnu gerast beinan vegin.

Tað er ikki neyðugt at finna sparingar á fíggjarlógini fyri at fíggja 50 mill. árliga til Sandoyartunnilin.

Og tað er eisini nakað av rímiligheit í loysnini. T.d.

Tey økini í landinum, sum vóru so heppin at fáa undirsjóvartunnil fyrst, hjálpa eitt sindur til so at onnur øki eisini fáa sama møguleika. (Landskassin – tvs. øll - hava jú goldið stóran part av verandi undirsjóvartunlum).

Sjálvt um ein króna verður løgd oman á bensin/diesel-prísin, so er hann kortini lægri enn í okkara grannalondum.

Við bensin/dieselavgjaldinum koma øll at gjalda. Eisini útlendingar, sum koyra og keypa brennievni her í landinum.

Og tey sum brúka mest olju – tvs. slíta vegirnar mest – koma at gjalda mest.

Flestu eru samd um, at vit eiga at halda fram við at gera undirsjóvartunlar.

Tí má bera til at loysa málið - skjótt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða ráðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.